gult36 cyan36 magenta36 svart36



## TILTØK

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20: Uppbyggingarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20: Ungdómsmøti.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur. Evni: Fil. 2 - Viðmæli Timoteusar og Epafroditusar.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøldið kl. 19.00: Ungdómsrally, kl. 21.00: Bøn fyri býnum. Hóskvøldið kl. 19.00: Teen Xtreme, kl. 20.00: Bøn fyri Hvítusunnu í Rhema. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið bibliutími kl. 20.00, Efesusbr. 1. kap.
Mikukvøldið kl. 19.00 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti v/ Ásbjørn Bertelsen.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Manskórinum. Innsavnan til Ytrimissión. Barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20.00 venur Manskórið.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Rhema á Hálsi**
Týsdagin kl. 17.00: Felagsmøti í Rhema fyri fundarrøðini hjá Aril Edvardsen á hvítusunnu.
Mikukvøldið kl. 20.00: Evangeliskt møti.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30: A.T.A.P. barnaklubbur.
Sunnudagin kl. 11.00: Møti og sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

**Samkoman Immanuel**
Møti verður mikukvøldið kl. 20.00.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin 16. mai kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur. Ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.

**Saron, Vestmanna**
Mikukvøldið útimøti á Torginum kl. 21. Kaffi í Saron aftaná.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í morgin kl. 17.30–19.30: Miðdepilin – títt kvøld – tónleikur, spøl, ítriv og matgerð.
Hósdagin kl. 16–17.30: Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18–19.00: Bønarmøti.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Áki Andreassen talar. Evni: Tey, ið uttanfyri eru.

**Ørkin, Saltangará**
Húsmøti verður týskvøldið kl. 19.00 í Saltangará hjá Jonnu & Palla Højgaard, Saltangará.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið 17. mai verður ungdómsmøti hjá John Kára Jacobsen í Hvannasundi. Farið verður frá SDO kl. 19.45.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18: Møti við Hjalgrím Davidsen.
Mánakvøldið kl. 20: Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Bíbliutími verður mikukvøldið 16. mai kl. 20.00.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin 15. mai kl. 20: uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Týskvøldið kl. 20.00: Bønarmøti. Evni: Róm. kap. 2. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kjære nordmenn på Færøyene!**
17. mai feires hos Sólvá og Ole Kristian Valle, Varðabyrgi 20, Tórshavn, kl. 19.00. Vel møtt

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 14. mai:*
kl. 09.45-10.15: Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18: Vit tøva
kl. 14-18: Kortspæl, telving og onnur spøl.

**Suðuroyartúrin gjaldast!**
*Týsdagin 15. mai:*
kl. 10-12: Vit baka til
kl. 15: Hugleiðingar um Havnina í 1920-unum - næstseinasti partur - Hjørdis Háberg
*Mikudagin 16. mai:*
kl. 10-12: Opið hús
kl. 12: Stongt
**Túrur til Suðuroyar: Farið verður kl. 19.00 úr Havn. Aftur av Tvøroyri 18.5. kl. 15.00. Gjaldast áðrenn.**
*Hósdagin 17. og fríggjadagin 18. mai: Stongt*

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20–21.30.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

**Giktafelag Føroya**
*MBF Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 fax 310813*
*e-mail: gikt@post.olivant.fo*
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð: Sára, tlf. 373106. E-mail: sara@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

**Føroyingafelagið við fjørðin**
**Jægerspris.** Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

**Føroyingarfelagið í Aalborg**
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail: ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

### 80 ár

Mikudagin 18. mai verður Poulina Mohr Jacobsen, Vágur, 80 ár.
Føðingardagurin verður hildin kl. 16–20 í Eldrasambýlinum í Vági.

### Prógv

Jenný Petersen, Funningur hevur tikið prógv sum socialráðgevi á universitetinum í Aalborg.

### BRÚDLEYP

Leygardagin 16. juni kl. 16 giftast í prestagarðinum í Vági Gunnbjørg Magnussen, Vágur, og Torri Thomsen, Sumba.
Brúðarveitslan verður í Samkomuhúsinum í Sumba kl. 19.00 fyri innbodnum gestum.

Leygardagin 26. mai kl. 16.00 giftast í Leirvíkar kirkju Heri Olsen, Toftir, og Sigmund Christiansen, Leirvík.
Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 15. mai á tlf. 443205 - 443146 ella 447568.

gult37 cyan37 magenta37 svart37



# Kann ikki lata vera við at mála



Rannvá Mortensen frammanfyri ein av málningum sínum.
Mynd Jan Müller

**Rannvá Mortensen er sjálvlært listafólk, og nakað av tí, sum hon hevur at bjóða uppá, er at síggja í Smiðjuni í Lítluvík nakrar dagar fram.**

LIST
*Heri á Rógvi*

Orðini í yvirskriftini eigur Rannvá Mortensen. Rannvá hevur í hesum døgum eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har hon vísir hvat eitt sjálvlært listafólk kann fáa burturúr. Framsýningin umfatar 34 listaverk, og rúmar framsýningin bæði brotamyndum, oljumálningum, akryl og grafikki. Tað skal eisini sigast, at framsýningin er rættiliga fjøllbroytt í so máta. Tó er tað nú einaferð soleiðis, at tú í flestu førum kann hóma eina ávísa linju ella stíl hjá einum listafólki, og hetta kann eisini sigast í hesum førinum. Rannvá sigur sjálv, at hon ”eksperimenterar” rættiliga nógv við sínum verkum, og hetta sæst eisini aftur á framsýningini. Framsýningin inniheldur verk, sum viðgera tjóðskaparliga spurningin í brotamyndum, umframt at pláss eisini er fyri bæði Che Guevara og abstraktum verkum, sum fylla størsta partin av framsýningini.

### List fulla tíð

Rannvá Mortensen hevur fingist við list á henda hátt í fimm ár. Eitt, sum serliga hevur verið at hoyrt, tá navnið Rannvá Mortensen kemur upp at venda er, at hon er sjálvlærd. Hetta mátti Rannvá Mortensen royna at útdýpa, tá hon sat yvirav manninum við blokkinum. Rannvá sigur, at hon gongur á kvøldskúla, og hon hevur eisini eitt háskúlauppihald í skjáttuni, men hetta kann metast sum skipað útbúgving, ið eitt nú onnur føroysk listafólk hava. Rannvá sigur, at hon heilt einfalt ikki kann lata vera við at mála. Hesa seinastu tíðina hevur Rannvá virka sum listafólk burturav, men hon ásannar, at tað ikki er henda yrkisleiðin, sum fitar pengapungin nakað stórvegis. Rannvá hevur fingið stuðul ymstastaðni frá, men tey eru nógv, ið kappast um tær lutfalsligu fáu stuðulskrónurnar. Tað er tó framvegis hennara fremsta ynski at virka sum listafólk fulla tíð. Hóast tað er rættiliga trupult at skula sita og lýsa seg sjálvan, so sigur Rannvá seg vera ”ekspressjonist”, og hetta sæst eisini aftur á framsýningini, har reyði liturin fyri tað nógva setur dám á. Rannvá sigur víðari, at henni dámar óføra væl at royna nógv ymiskt, og umframt tey mongu listaverkini í Smiðjuni, so fæst hon eisini við at gera skulpturar, men hesar lat hon standa eftir heima hesuferð. Rannvá sigur, at hon er rættiliga ”disiplinerað” í sínum dagliga arbeiðsdegi sum listafólk. Henni dámar so sera væl at fáast við list, og ikki kann sigast annað enn, at hon er rættiliga virkin.



*Fleiri kendar listakvinnur nýttu høvi at vitja framsýningina hjá Rannvu í Smiðjuni í vikuskiftinum.*
Mynd Jan Müller

### Ikki komin langt

Rannvá hevur nú fingist við list í fimm ár, og hon er at meta sum rímiliga nýggj í fakinum. Rannvá sigur, at við hesari, eins og við teimum undarfarnu framsýningum, so finnur hon útav, hvussu stutt hon er komin. Tað er eisini m.a. hetta, sum Rannvá heldur vera spennandi við at fáast við list, umframt tað, at ein hevur brúk fyri at úttrykkja seg uppá onkran máta, sum hon tekur til.

Tá spurningarnir fara at snúgva seg um framtíðina, so sigur Rannvá, at hon sjálvandi kundi hugsað sær at liva av listini, og samstundis kundi hon eisini hugsað sær eitt sindur av lærdómi innan tey mongu listaøkini. Henda framsýningin er bæði eitt høvi hjá henni at vísa síni verk fram, og samstundis eisini eitt høvi at kunna vinna sær nakrar krónur, hóast hetta er ikki tað, sum hevur mest at siga, men nakrar krónur skulu til.

Rannvá er eisini virkin í einum bólki av listafólki úr Svøríki. Samstarvið við bólkin hevur m.a. givið henni møguleikan at sýna fram síni listaverk í Madrid. Bólkurin arbeiðir víðari við onkrum ætlanum, og Rannvá sigur, at hetta gevur henni okkurt at arbeiða framímóti.

Spurd um støði í føroyskari list yvirhøvur, sigur Rannvá, at hon heldur føroyska list stundum vera heldur stirvna. Her sipar hon til allar tær nógvu myndirnar av landsløgum, sum føroysk listafólk eftir øllum at døma hava tokka til. Rannvá leggur tó dent á, at tað so sanniliga eru fleiri frálík listafólk í Føroyum, har Ingálvur av Reyni einamest hevur inspirerað hana.

Framsýningin er opin til fríggjadagin 18. mai, og er hetta ein møguleiki hjá fólki at síggja fjøllbroytta list hjá einari kvinnu, sum ikki kann lata vera við at mála.


